# Aðalfundur og bjargingarroynd á Eiði

**Landsfelagið hjá bjargingarfeløgunum hevði aðalfund á Eiði í vikuskiftinum. Sjálvur fundurin var fyrrapartin, og seinnapartin skipaði so Eiðis Bjargingarfelag fyri einari bjargingarroynd**

AÐALFUNDUR
*Solby A. Eliasen*



*Landsfelagið fyri bjargingarfeløg í Føroyum hevði aðalfund á Eiði í vikuskiftinum. Har var millum annað ein bjargingarroynd, sum Eiðis Bjargingarfelag stílaði fyri*
*Mynd: Jens K. Vang*

Bjargingarroyndin, sum fór fram á landi fyri tað mesta, vísti, hvussu ein tílík roynd fer fram í dag í mun til fyrr. Landsfelagið fekk ein bjargingarstól sum gávu í 1957, og hann varð nýttur henda dagin á Eiði. Tað gongur fyri seg á tann hátt, at ein lína verður skotin út við eini rakett í neyðstadda skipið og síðani verður ein tjúkk linja drigin út. Tey neyðstøddu verða so spend føst í stólin og drigin til lands. Soleiðis varð gjørt fyrr í tíðini. Í dag eru bæði tyrla og verjuskip. Men tað kann jú koma fyri, at hesi bæði av eini ella aðrari orsøk ikki kunna koma. Tað veri seg vindur ella mjørki ella okkurt heilt annað.

– Í tílíkum førum kann tað verða sera hent at duga hendan framferðarháttin, sigur Eyðbjørn Mørkøre, formaður í Eiðis Bjargingarfelag.

Hann sigur, at royndin eydnaðist væl, og alt gekk sum tað skuldi.

Somuleiðis vónar Eyðbjørn, at hetta at aðalfundirnir hjá landsfelagnum verða hildnir kring landið, fer at verða við til at kveikja áhugan fyri bjargingarfeløgunum aftur.

– Tað er so sum so við áhuganum. Og tað letur tað til at vera allastaðni í landinum. Hjá okkum er tað fyri tað mesta sama fólkið, sum er í Sløkkiliðinum, sigur Eyðbjørn Mørkøre.

Tað var ikki so gott veður, meðan royndin fór fram, men hóast tað, so var heilt fitt av fólki og hugdu at.

### Meiri samanhald

Men tað var sum sagt ikki bara bjargingarroynd henda dagin. Aðalfundur felagsins var eisini fyrrapartin henda dagin. Har varð tosað um mangt og hvat. Serliga varð tosað um, hvussu tað verður framyvir við feløgunum, og hvat kann gerast fyri at skapa størri áhuga.

Jens Hansen, næstformaður, sigur, at dreymurin er at fólk fara at standa meira saman um bjargingarfeløgini.

– Føroyingar eru óførir at hjálpa, tá tað stendur á, tað vita øll. Men eg hevði viljað, at øll stóðu meira saman her, sigur hann.

Bjargingarfeløgini hava nú eisini fingið egnan búna, og tað fegnast Jens Hansen, sum var formaður í landsfelagnum frammanundan aðalfundinum.

– Við nýggju búnunum fara vit at verða sjónligari líka sum løgregla, sjúkraflutningstænastan og sløkkiliðini, sigur hann. 100 búnar eru býttir út til tey níggju feløgini.

Jens Hansen sigur, at av tí at feløgini eru allastaðni kring landi, so hevur landsfelagið gjørt av at leggja aðalfundirnar úti á lokalstøðunum. Hetta gevur eina vissa breidd og kann verða við til at skapa størri áhuga millum fólk, heldur hann.

Eisini fegnast hann um, at umboð, sum felagið hevði boðið við, fyri ymsar stovnar vóru við á fundinum. Tað heldur hann er tekin um, at tað sjálvbodna arbeiðið, sum feløgini kring landið gera, verður góðtikið. Og at áhugi er fyri tí.

Nýggj nevnd var eisini vald á aðalfundinum. Tað eru níggju av tíggju bjargingarfeløgum í landinum, sum eru limir í landsfelagnum, og hvørt felag sær ger av, hvør skal umboða teirra felag í nevndini. Sostatt eru níggju limir í nevndini.

Nevndin skipaði seg eftir aðalfundin við Poul Klementsen sum formanni, Jens Hansen, næstformanni og Jóhonnu Hansen sum skrivara og kassameistara.

# Omanlop á Viðareiðisvegnum

**Tvey omanlop hava verið á Viðareiðisvegnum hesa vikuna. Ongin skaði er tó hendur**

OMANLOP
*Solby A. Eliasen*

Tað fyrra omanlopið var Flaggdagin og tað seinna mánamorgunin. Í báðum førum var talan um rættuliga stórt grót, sum sambært Landsverkfrøðinginum ikki var mannbart.

– Tað eru komin merki í asfaltið, men ongin skaði sum so er hendur, sigur Landsverkfrøðingurin.

Hóast okkurt grót fór upp um autoverjuna, so fekk hon heldur ongan skaða av omanlopunum báðum.

Landsverkfrøðingurin sigur, at tað leypir soleiðis av og á á Viðareiðisvegnum, men tað er ongantíð nakar álvarsligur skaði hendur.

Ein annar líknandi vegur er eisini í landinum. Tað er vegurin til Tjørnuvíkar. Hann liggur sum Viðareiðisvegurin langt uppi og er sera smalur.

– Har leypir eisini onkuntíð, verður sagt frá Landsverkfrøðinginum. Men tað er sum sagt ongantíð nakar álvarsligur skaði hendur.



*Tvey omanlop hava verið á Viðareiðisvegnum innan eina viku. Í báðum førinum var talan um so stórt grót, at tað ikki var mannbart*
*Mynd: Jákup Mohr*

# Sam siglir bert við farmi

**Mánadagin frættust tíðindi um, at Sam hevur mist loyvið at sigla við ferðafólkum um Leirvíksfjørð**

STRANDFERÐSLA
*Solby A. Eliasen*



*Í hesum døgum siglir Sam bert við farmi, tí Skipaeftirlitið ikki vil endurnýggja siglingarloyvið fyrr enn tað hevur gjøgnumgingið tey seinastu tølini hjá Sam*

Sam siglir bert við farmi fyri tíðina um Leirvíksfjørð. Siglingarloyvið hjá Sam er útgingið, og Skipaeftirlitið vil ikki endurnýggja tað, fyrr enn tað er liðugt við at gjøgnumganga tey nýggjastu tølini fyri hann.

Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandferðsluni, sigur, at útrokningarnar frá Strandferðsluni vórðu latnar Skipaeftirlitinum áðrenn jól. Og tað tí helst er bara spurningur um tíð, inntil viðurskiftini verða í rættlag aftur, og Sam kann halda fram við ferðafólkaflutninginum.




Fiskimálaráðið
*Fiskiveiðueftirlitið*

## Leingjan av umsóknarfreist

Vísandi til lýsingar eftir maskinstjórum, 1. meistarum og 2. meistarum, sum fyrstu ferð vóru lýstar í viku 11.

Fiskiveiðieftirlitið hevur avgjørt, at leigja freistina at senda inn umsókn.

Um tú hevur vinnubræv, svarandi til eina av lýsingunum, og hevur tú áhuga í einum starvi, har vanliga arbeiðstíðin bert er 165 dagar árliga, so send eina umsókn til:

**Fiskiveiðueftirlitið**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

Umsóknir skulu verða Fiskiveiðueftirlitinum í hendi áðrenn kl. 12.00 mánadagin tann 5. mai 2003.

Hava tygum spurningar viðv. størvunum eru tygum vælkomin at ringja tlf. 353030.

*Tey, sum hava sent umsókn inn til nevndu størv, skulu ikki senda nýggju umsókn. Tær umsóknir, sum eru innkomnar til størvini verða viðgjørdar á jøvnum føti við umsóknir, sum koma inn eftir hesa lýsing.*


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3540
**Navn:** Sp/f Álkan
**Adressa:** 650 Toftir
**Kommuna:** Nes Kommuna
**Stovningardato:** 02.04.2003
**Viðtøkudato:** 02.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Jens Christian Olsen, Undir Nesinum, 650 Toftir og Atli Joensen, Undir Nesinum, 650 Toftir
**Stjórn:** Jens Christian Olsen, Undir Nesinum, 650 Toftir og Atli Joensen, Undir Nesinum, 650 Toftir
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av tveimum stjórum.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 02.04.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskivinnu og aðra vinnu í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 24. apríl 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3538
**Navn:** Sp/f T.F.D.H. Kranakoyring
**Adressa:** Sívarsvegur 6, 188 Hoyvík
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 03.04.2003
**Viðtøkudato:** 03.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 91.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 91.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Sp/f Tom Hellisdal, 100 Tórshavn (Sp/f 2844)
**Stjórn:** Tom Hellisdal, Sívarsvegur 6, 188 Hoyvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f Revisión v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 03.04.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka lastvognskoyring, flutningsvinnu og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 24. apríl 2003*

*Kristin Balle*


www.vestmannabjorgini.com

Føroya Handilsskúli
TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

## Nýggja leiðaraútbúgvingin »Diplomleiðara útbúgving«

**Nøkur pláss eru eftir á hold 2, ið ætlanin er skal byrja tann 8. mai 2003.**

Útbúgvingin, sum tekur 2 ár, er býtt upp í 4 hálvár við 10 møtidøgum hvørt hálvár, hvør møtidagur er frá kl. 09.00-16.00.

Talan er um eina útbúgving, sum leggur dent á praktiskar og brúksrættaðar leiðsluførleikar. Útbúgvingin verður roknað sum ein góð barlast hjá leiðarum. Serliga hjá teimum, sum hava arbeitt við leiðslu, men ikki hava nomið sær útbúgving innan starvsfólkaleiðslu.

**Tilmelding:** Skjótast, í seinasta lagi 2. mai 2003

Tilmeldingarblað, tilfar og tíðarætlan fæst við at venda sær til dt@hsh.fo
ella tel. 318813, spyr eftir Doris Tróndarson ella Georg Suðurgarð

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374, t-postur dt@hsh.fo

LOVE
2. hvønn mikudag
<ph_1>
<ph_1>

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

## Heilafelagið

Aðalfundur verður mikudagin 14. mai kl. 18.00 í MBF-húsinum.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

Náttturið verður aftaná.

Møguleiki er at tekna seg sum lim.

**Nevndin**

## Lærari

Skopunar skúli sóknast eftir lærara komandi skúlaár.

Ynskiligt er, at tann, ið sett/-ur verður, kann taka á seg at undirvísa í svimjing og kanska eisini í tónleiki.

Umsóknir við viðkomandi prógvum verða at senda skjótast til ber til:

**Skúlastýrið við Skopunar skúla**
v/ Kristrún Kjærbo, form.
FO-240 Skopun

Meira kann fáast at vita við at ringja til 361696 ella 217696.

IRAK HJÁLPIN
Giro 77011
ella konto hjá okkum í peningastovnunum
REYÐI KROSSUR FØROYA